# Tryggari internetdagur

# Vælkomin




FØROYA TELE

SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi

nema




# Hvat er Tryggari internetdagur?

- Altjóða átak
- Stovnað av ES-kommisjónini í 2004
- Næstan 200 lond eru við
- Í Føroyum síðani 2018

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

FØROYATELE

SSP Skúli Sosialir myndugleikar Politi

nema

Endamálið:

at ung í Føroyum læra, hvussu tey kunnu ansað eftir sær sjálvum og øðrum á netinum, har mørk og rættindi verða viðurkend.

FØROYA TELE // SSP Skúli Sosialir myndugleikar Politi nema

# Hvussu arbeiða vit við at røkka hesum endamálinum?

Velja nýtt evni hvørt ár, ið er viðkomandi millum tey ungu og kann verða ein trupulleiki fyri talgildu trygdina

Samleiki á netinum

Teldusníkar

Lokking

Myndadeiling á sosialum miðlum

Talgildur harðskapur

# Evnið í ár

## VITLÍKI

- Snilt, men er tað altíð snilt?

Deep fake

Ólóglig myndadeiling

Kynslig avnoyðsla

Lokking

FØROYA TELE   SSP Skúli Sosialir myndulekar Politi   nema

# Mannagongdin

1. Tríggir evnisdagar fyri allar flokkar í hádeild, ið eru eins, men ymsa staðni í landinum.

**Evnisdagur í Norðurøkinum**

1. oktobur 2024 í Løkshøll við Løkin

**Evnisdagur í Suðuroynni**

2. oktobur 2024 í Salt á Drelnesi

**Evnisdagur í Tórshavn**

3. oktobur 2024 í Høllina á Hálsi

FØROYA TELE · SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi · nema

# Mannagongdin

1. Tríggir evnisdagar fyri allar flokkar í hádeild, ið eru eins, men ymsa staðni í landinum.

Evnisdagur Løkshøll, 1. okt 2024

## Skrá

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00-09.30: | Vælkomin og ársins evnið<br>*- SSP* |
| Kl. 09.30-10.00: | Vitlíki - Fyrimunir og vansar<br>*- Nám* |
| Kl. 10.00-10.20: | Steðgur |
| Kl. 10.20-10.40: | Hvat sigur lógin<br>*- Føroya Politi* |
| Kl. 10.40-11.00: | Tú og eg ráðgevingin<br>*- Barnabati* |
| Kl. 11.00-11.15: | Kapping<br>*- Nema og Føroya Tele* |
| Kl. 11.15-11.45: | Live tónleikur<br>*- Ingi Poulsen og Danny Baldursson* |
| Kl. 11.45-12.00: | Takk fyri í dag |

# Mannagongdin

1. Tríggir evnisdagar fyri allar flokkar í hádeild, ið eru eins, men ymsa staðni í landinum.
2. Kappingin fer í gongd.
3. Vinnarin verður avdúkaður á skúlanum hjá viðkomandi.

Hvat: Sjón-/ljóðband um ársins evni "Vitlíki".

Hvussu langt: Hægst 4 min

Hvør kann vera við: Allir flokkar í hádeild.

Freist: 11. februar 2025.

Hvussu letur man inn: senda leinki inn umvegis okkara tilmeldingarskipan á tid.fo (leinkjan kann gerast umvegis Wetransfer.com ella Youtube).

Vinnarin verður avdúkaður: 3. mars 2025.

Vinningur: 20.000 kr.

Endamál við sjón-/ljóðbandinum: at kunna nýtast í fyribyrgjandi høpi. Tí er týdningarmikið at uppskotið kann nýtasti á almennum pallum, sum á heimasíðum, sosialum miðlum, foreldrafundum osfr.

Jákup

Áhhh nice... dámar tú eisini Ed sharon

Eg dámi teg.

Ja. Mær dámar væl Ed sharon,
mær dámar sangir um kærleika

Tú ert elskiligur.

Ikki so elskilig sum tú :)



# Les meira á tid.fo og fá:

- vitan um tryggari internetdagin
- skránna fyri dagin
- innlit í fyrrverandi vinnarauppskot
- vitan um reglur
- íblástur til tykkara verkætlan

www.tid.fo

FØROYA TELE

SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi

nema

SSP Edit Page Edit with WPBakery Page Builder Howdy, Súsanna í Króki




# Tryggari internetdagur 2025

Í ár er evnið “**Vitlíki – snilt, men er tað altíð snilt?**” herundir:

- Deep fake
- Happing
- Óloglig myndadeiling
- Kynslig avnoyðsla
- Lokking

Tryggari internetdagurin byrjar við trimum evnisdøgum 1., 2. og 3. oktobur 2024, ið eru eins, men ymsa staðni í landinum, fyri at flest skúlar kunnu luttaka.

- **1. okt. 2024** kl. 09.00-12.00 í **Løkshøll** í Runavík.
- **2. okt. 2024** kl. 10.30-13.30 í **SALT** á Tvøroyri.
- **3. okt. 2024** kl. 09.00-12.00 í **Høllini á Hálsi** í Tórshavn.

Evnisdagarnir eru ætlaðir flokkar í hádeild og hava til endamáls at fyribyrgja, at føroysk ung enda í vandamiklar talgildar støður. Á døgunum fáa øll sostatt vitan um, hvussu ung kunnu ansa eftir sær sjálvum og øðrum á netinum, har mørk og rættindi verða viðurkend. Í hesum sambandi koma SSP, Nám, Føroya Politi og Barnabati at greiða millum annað frá fyrimunir og vansar við vitlíki, hvat sigur lógin um hetta og hvar ung kunnu venda sær fyri at fáa hjálp.

Aftaná evnisdagarnar fer okkara árliga kapping í gongd, har allir flokkar í hádeild (7., 8., 9. og 10. fl.) kunnu gera eitt sjón-/ljóðband um ársins evnið **"Vitlíki – snilt, men er tað altíð snilt?"** og lata tað inn í seinasta lagi 11. februar 2025 á tid.fo. Flokkurin við besta uppskotinum vinnur **20.000 kr**. Við fyribyrging fyri eygað og fyri at styrkja felagsskapskensluna, so viðmæla vit, at tað ikki eru fleiri bólkar frá sama flokki, ið gera hvør sítt uppskot, men heldur eitt uppskot, ið allur flokkurin er felags um.










## Kappingin

# Kappingin

Ynskir tín flokkur í hádeild at vera við í kappingini, so ber til at lesa her fyri at fáa vitan um mannagongd, reglur, freistir og møguligan íblástur.

## Mannagongd

Mannagongdin er, at aftaná evnisdagarnar eru loknir 1., 2. og 3. okt 2024, so eru allir flokkar vælkomnir at byrja teirra verkætlan til kappingina. Ymiskt er, hvussu flokkar velja at arbeiða, tá talan er um tíð, uppgávubýting millum floksfelagar osfr., so tað er heilt upp til hvønn einstakan flokk (og flokslærara), hvat riggar best fyri tey. Nøkur byrja at fyrireika seg beinanvegin og nýta javnan tíð uppá verkætlanina, til freistin er farin, meðan onnur nýta bert sjálva dagin, freistin er, ið eisini er dagurin Tryggari internetdagurin verður hátíðarhildin kring heimin. Tí er tað týdningarmikið at ráðleggja saman við flokslæraran, hvussu tit ætla at gera og at flokslærarin, og td SSP-lærarin, hjálpir við at býta uppgávurnar millum næmingarnar. Til dømis, um verkætlanin skal vera ljóð-/sjónband, hvat evnið skal vera, hvør skal vera leikstjóri/leiðbeinari, hvør skal taka film/ljóð, hvør skal hjálpa við staðseting/høli osfr. Á henda hátt er ynskið, at allir næmingar í flokkinum fáa ein leiklut í verkætlnini, stórar sum smáar, ið kann styrkja felagsskapskensluna, tá hon er liðug.

## Reglur

Verkætlanin skal:

- vera sjón- ella ljóðband.
- vera á hægst 4 minuttir.
- lýsa ársins evnið.
- hava fyribyrgjandi endamál.
- latast inn umvegis okkara tilmeldingarskipan.
- kunna nýtast av SSP at koyra á almennar pallar, sum sosialar miðlar, foreldrafundir og annað.

## Freist

Øll uppskot skulu latast inn umvegis okkara tilmeldigarskipan.

Freistin fyri innlating er **týsdagin 11. februar 2025 á midnátt.**

Vinnarin verður avdúkaður **mánadagin 3. mars 2025** á skúlanum hjá flokkinum, har hann fær handað gávukekk á **20.000 kr**.

## Íblástur

Í 2023 varð orðið **vitlíki** kosið ársins orð í Føroyum, ið er føroyska heiti fyri Artificial Intelligence (AI).

Ársins orð undirstrikar, at vitlíki er vorðin partur av dagsins samfelagi og hevur týdning og ávirkan bæði í skúla- og privatlívi hjá børnum og vaksnum. Ofta hugsa vit fyrst um stórar málmyndlar og kjattmenni sum t.d. ChatGPT og MyAI á Snapchat. Í føroyskum høpi kann fyrimunurin við vitlíki vera, at tað kann hjálpa okkum at skapa møguleikar fyri at framleiða tekst og myndir á nýggjan hátt, bæði innan skúla og millum vinir. Av tí at funkan er nýggj, vita vit ikki allar møguligar vansar, ið kunnu koma av henni og hvussu eftirfarandi tekstur og myndir kunnu verða. Serliga, um talan er um tilgjørdar myndir av vinum, kenningum ella makum, millum tey ungu, ið kunnu leggjast út á nógvar almennar pallar, sum Instagram ella bólkar á Snapchat.

vit fyrst um stórar málmyndlar og kjattmenni sum t.d. ChatGPT og MyAI á Snapchat. Í føroyskum høpi kann fyrimunurin við vitlíki vera, at tað kann hjálpa okkum at skapa møguleikar fyri at framleiða tekst og myndir á nýggjan hátt, bæði innan skúla og millum vinir. Av tí at funkan er nýggj, vita vit ikki allar møguligar vansar, ið kunnu koma av henni og hvussu eftirfarandi tekstur og myndir kunnu verða. Serliga, um talan er um tilgjørdar myndir av vinum, kenningum ella makum, millum tey ungu, ið kunnu leggjast út á nógvar almennar pallar, sum Instagram ella bólkar á Snapchat.

Í Føroyum hava vit eina revsilóg, ið vísir til, hvørji rættindi vit hava á netinum: logir.fo.

| | | | |
|---|---|---|---|
| At taka myndir §264 a. | Myndadeiling §236 | Myndir liggjandi á telefonini §236, Stk 2. | Samtykki §236, Stk 3. |
| Deep fake §264 d. | Hóttanir § 266. | Lokking (Grooming) § 229. | Kynslig avnoyðsla (sextortion) § 225. |

**Niðanfyri ber til at síggja filmar um fyrimunir og vansar við vitlíki**






Niðanfyri ber til at síggja filmar um fyrimunir og vansar við vitlíki






# Kapping

- Dáma síðuna Samanánetinum
- Dáma seinasta uppslagið "Kapping"
- Vinningur: gávukort frá Føroya Tele og Nema
- Vinnarin verður funnin aftaná evnisdagarnar

Instagram:
samananetinum

FØROYATELE // SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi nema

# Takk fyri í dag

FØROYA TELE

SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi

nema

FØROYATELE

SSP
Skúli
Sosialir mynduleikar
Politi

nema